# Autisma lokkaði nógvar áhoyrarar



*Autisma viðgjørd í Miðlahúsinum*

**Týskvøldið varð skipað fyri almennum fundi um autismu í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Ein sálarfrøðingur og ein pápi vóru komnir úr Danmark at greiða frá teirra royndum á økinum haðani, og harafturat tóku Hans Eli Dahl og Hans Pauli Strøm lut**

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Týskvøldið skipaði Landsfelagið fyri fólk við autismu fyri almennum fundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Heitið á fundinum var Autisma og visjón 2015: Hava fólk við autismu tað líka gott sum tú og eg í 2015 – og hvat gera vit, meðan vit bíða?

Húsið var stúgvandi fult - eini 120 fólk vóru komin oman í Miðlahúsið – og til at svara hesum spurningum hevði felagið boðið fýra luttakarum at sita við pallborðið. Hesir vóru Lennart Pedersen, sálarfrøðingur og fakligur ráðgevi hjá Center for Autisme i Danmark, Morten Carlsson, foreldur og formaður í Landsforeningen Autisme í Danmark, Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, og Hans Eli Dahl, leiðari á Sernámsdeplinum.

Byrjað varð við einum umfari, har teir fýra luttakararnir løgdu sínar metingar og sjónarmið fram. Av tí at tveir teirra vóru danir, var alt orðaskiftið hetta kvøldið á donskum. Eftir ein kaffisteðg, varð fundurin tikin uppaftur, og eftir eina framløgu afturat slapp fundarfólkið at sína hugsan og skifta orð við pallborðið.

### Diagnosan týdningarmikil

Jón Brian Hvidtfeldt, útvarpsmaður, var orðstýrari, og hann kom væl frá uppgávuni at skipa kjakið. Tá hann við fundarlok um hálvgum ellivutíðina týskvøldið kundi taka samanum, staðfesti hann, at nógv positivt var komið fram. M.a. at tað er týdningarmikið, at diagnosan autisma verður sett fyrr í lívinum nú, enn gjørt varð fyri nøkrum árum síðani; at fáa betri diagnosumøguleikar, menning av fakliga førleikan, og hvussu umráðandi tað er at seta seg inn tíðliga, miðvíst og fakliga við fakligum toymum.

Orðstýrarin endurgav eisini landsstýrismannin fyri at hava sagt á fundinum, at sjálvandi skulu autistar eisini fáa ágóða av visjón 2015, at tørvur er á búplássum, ekspertisu, og at ætlanir eru um at byggja vitananrdepil upp. Eisini varð víst á, at sambært hagtølum eru 300 autistar í Føroyum, og hesi eru spjadd um alt landið, og tí er eisini neyðugt við ráðgeving kring alt landið.

Eisini varð víst á tørvin á at stuðla familjunum hjá autisyum við skeiðum og ráðgeving.

At enda takkaði Lea Wolles, forkvinna í Landsfelagnum fyri fólk við autismu fyri ta góðu undirtøkun hetta kvøldið. Danirnir fingu eitt føroyakort til minnis um ferðina og sum tøkk fyri at seta autismu á kortið. Hans Pauli Strøm og Hans Eli Dahl fingu ávikavist eitt modell av nýggja Smyrli og eitt modell av Norðoyatunlinum, sum eina áminning um, at tað sum ein setur sær fyri politiskt, kann fremjast í verki.

## FAKTA UM AUTISMU

Mett verður, at 0,6 % av fólkatalinum, tvs. at eini 300 føroyingar, hava autismu.

Í stuttum orðingum ber til at siga, at fólk autismu hava framúr góð evni at sansa, men sera vánalig evni at fata. Nøkur teirra kunnu sansa alt, ið hendir rundan um tey, hvørja evarska lítla broyting. Men tey eru ikki før fyri at skipa tað, tey sansa, og og skapa heildir, ið geva meining.

Ofta fata fólk við autismu ikki tað, tey sansa, og megna ikki at sálda óviðkomandi ljóð o.a. frá. Børn við autismu kunnu tí fáa tað trupult, um rútman í gerandisdegnum skiftir ov nógv.

Tað finnast nógv stig innan autismu, og ógvuliga misjavnt er, hvussu hart rakt fólk eru av hesum. Ein grein innan autismu kallast Asbergers syndrom og varð staðfest sum diagnosa í 1992. Hesi eru ofta ment eins og onnur sokallað normal fólk, t.d. er førleikin at tosa púra vanligur, men ymisk frávík í menningini kunnu vera, t.d. í sosialum viðurskiftum við onnur.

# Vitanin nógv økt seinastu árini

Lennart Pedersen, sálarfrøðingur, hevur arbeitt við autistum í 25 ár, harav fleiri ár í Føroyum. Sjálvur metti hann, at um vit skulu hyggja 10 ár fram til 2015, er fyrst neyðugt at líta 10 ár aftur í tíðina, tá lítið av vitan var um hetta evnið. Nógv er broytt hesa tíðina, tí í dag eru vit munandi dugnaligari til at seta diagnosuna. Fyrr kundu børn verða heilt upp í 8-10 ára aldur, áðrenn staðfest varð, at tey høvdu autismu, og tí vóru nógv, sum onga diagnosu fingu.

Í dag ber til at seta diagnosuna longu í 3-5 ára aldri. Fyri 10 árum síðani var vanligt, at børnini vórðu eygleidd heilt upp til eitt ár, áðrenn nøkur diagnosa varð sett. Hetta kundi vera strævið hjá børnum og foreldrum, tá tey noyddust niður á Bispebjerg Hospital í so drúgva tíð. Í dag ber hinvegin til at gera royndir, har úrslitið er klárt rættiliga skjótt, greiddi Lennart Pedersen m.a. frá.

Eisini er vitanin í dag rættiliga spjadd, so at hon nú er líka stór og jøvn á teimum ymsu psykiatriksu deplunum, og diagnosurnar eru javnari, fyrri og greiðari. Enn vanta tó fólk í Føroyum, sum eru før fyri at gera hetta.

Lennart Pedersen segði seg eisini skilja, at støðan eisini var nógv batnað í Føroyum, sum dúva upp á fakliga ekspertisu úr Danmark. Um man framyvir vil vil byggja upp egna ekspertisu ella brúka danska, verða føroyingar noyddir at taka støðu til.

Hyggja vit aftur í sjeytiárini, hvussu autistar kláraðu, sá myndin ikki góð út. Tey flestu kláraðu seg ikki væl í samfelagnum. Í dag er støðan øðrvísi og fleiri autistar klára seg hampiliga væl sum vaksin. Lennart Pedersen metti, at í mun til støddina á Føroyum, er gongdin á hesum økinum eisini rættiliga jalig.

– Men hvussu við teimum næstu 10 árunum, spurdi Lennart Pedersen.

Av tí at fleiri fáa eina diagnosu sum autistur ásetta, fáa eisini alt fleiri fakfólk vitan um autismu. Tí veksur tørvurin á ráðgeving og sokallaðari supervisjón ella umsjón. Sum er, er hetta virksemið tó ov spjatt í Føroyum. T.d. nevndi Lennart Pedersen, at hann sjáldan hevði ráðgivið somu fólkum um somu børn í meira enn tvey ár á rað her í Føroyum, og tað metti hann vera óheppið.

Tí tað er neyðugt at stuðla foreldrum og familjum annars fakliga, men tað er sera avmarkað, hvussu skeiðsútboðið higartil hevur verið.